**Foreldrafundur 9. sep.**

Í stuttum tað, sum vit tosaðu um á fundinum:

- Tvílæraraskipan
  vit eru tveir lærarar inni í flokkinum 7 tímar um vikuna, í føroyskum 3 tímar og í støddfrøði 4 tímar, umframt Armgarð, sum er knýtt at flokkinum fulla tíð.

- Regglur í flokkinum
  - Næmingarnir skulu rætta hondin upp, tá tey hava nakað at siga
  - Um man kemur ov seint, so biður man orsaka og kemur stillisliga inn
  - Næmingarnir skulu vísa virðing og umsorgan fyri hvørjum øðrum
  - Man er róligur inni á skúlanum og kann larma úti

- Føðingardagar
  Næmingurin sleppur at velja okkurt spæl og at bjóða flokkinum okkurt smávegis etandi t.d. bjóða úr einum bommpakka, lítlar pk av smarties ella víndrúur.

- Ljóðføri
  Fleiri spæla ljóðføri í ár – ordiliga stuttligt – men hetta hevur við sær, at onkur hevur nógv heimaarbeiði, tá tey skulu gera onkra síðu lidna. Av tí at tey eru til ljóðføri, hava tey ikki gjørt so nógv í skúlanum.

- Dynamikkurin í flokkinum

  Í skúlanum:

- Tosa um týdningin at vera góð við hvønn annan
- Hugnatíma/floksins tíma
- Spæla ymiskt, øll saman og í bólki
- Fylgja næmingunum út í fríkorter

Heima:

- Vinarbólkar
- Føðingardag fyri øllum flokkinum. Hetta er eitt uppskot - heldur gera minni burturúr, stytta um tíðina og so hava allan flokkin.

Heimaarbeiði:

- Skriva okkurt gott um øll í flokkinum

Aftrat hesum varð tosað um føroyskt og støddfrøði, hvat tilfar verður brúkt v.m.